ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

INNANHÝS IS

26. januar 2016
Mál: 16/00106-1
Viðgjørt: Poula Lervig

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**
(flytan av kærumyndugleika í avgerðum um val av fosturforeldrum)

**§ 1**
Í Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 134 frá 9. desember 2005, løgtingslóg nr. 39 frá 8. mai 2007, løgtingslóg nr. 50 frá 8. mai 2007, løgtingslóg nr. 52 frá 8. mai 2012, løgtingslóg nr. 104 frá 24. oktober 2012 og løgtingslóg nr. 139 frá 18. desember 2013, verður gjørd henda broyting:

Aftan á § 65 verður sett:

"*Høvuðsbarnaverndarnevndin*

**§ 65a.** Avgerðir um val av fosturforeldrum, tiknar av Fosturforeldraskipanini, kunnu kærast til Høvuðsbarnaverndarnevndina innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. Høvuðsbarnaverndarnevndin kann víkja frá hesi freist, um serlig orsøk er til tað.

*Stk. 2.* Avgerðir um val av fosturforeldrum verða ikki freistaðar, um tær verða lagdar fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina.
*Stk. 3.* Avgerðir, tiknar av Høvuðsbarnaverndarnevndini sambært stk. 1, kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika og verða ikki freistaðar, um tær verða lagdar fyri rættin."

**§ 2**
Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

Henda broyting í løgtingslóg um barnavernd hevur til endamáls at flyta kærumyndugleikan í málum um avgerð um val av fosturfamilju frá kærunevndini í almanna- og heilsumálum til Høvuðsbarnaverndarnevndina.

Sambært galdandi lóggávu er tað Høvuðsbarnaverndarnevndin, ið tekur avgerð um eitt barn skal umsorganaryvirtakast. Tá avgerð um umsorganaryvirtøku er tikin, verður ein fosturfamilja vald til einstaka barnið. Tað er Fosturforeldraskipanin, ið umsitur skipanina við fosturforeldrum. Hetta inniber m.a. at góðkenna og taka avgerð um val av fosturforeldrum í ítøkiligu førunum, tá barn er umsorganaryvirtikið. Áður hevur val av fosturforeldrum verið mett sum faktiskt fyrisitingarvirksemi og hevur spurningurin um hvørt valið kann kærast ikki verið umrøddur.

Løgtingsins Umboðsmaður hevur í niðurstøðu, dagfest 2. mars 2015, staðfest, at val av fosturfamilju er at skilja sum ein fyrisitingarlig avgerð hjá Fosturforeldraskipanini, ið sambært § 65 í barnaverndarlógini kann kærast til kærunevndina í almanna- og heilsumálum. Føroya Kærustovnur, ið hevur um hendi skrivstovuna hjá bæði kærunevndini í almanna- og heilsumálum og Høvuðsbarnaverndarnevndini, hevur gjørt vart við, at avgerðin um at leggja kærumyndugleikan til kærunevndina er óheppin grundað á, at kærunevndin, ið er mannað við løgfrøðingi, lækna og sosialráðgeva, ikki hevur serliga vitan í hesum serstøku málum, ið eisini hava beinleiðis tilknýti til avgerðina um umsorganaryvirtøku. Høvuðsbarnaverndarnevndin, ið tekur avgerð um umsorganaryvirtøku, er hinvegin mannað við royndum løgfrøðingi, sálarfrøðingi og barnasakkønum. Grundað á samansetingina og serkunnleikan í nevndini eins og at limirnir í nevndini hava eina serliga vitan um hvørt einstakt mál við tað at málið um umsorganaryvirtøku frammanundan hevur verið viðgjørt í nevndini, verður mett, at Høvuðsbarnaverndarnevndin er betur skikkað til at vera kærumyndugleiki í hesum málum.

Mett verður ikki, at tað er ein trupulleiki, at tað er sama nevnd, ið kemur at taka avgerð um umsorganaryvirtøku og val av fosturfamilju grundað á, at talan er um tvær ymiskar avgerðir eins og at valið av fosturfamilju er ein týðandi liður í at tryggja, at umsorganaryvirtøkan røkkur sínum endamáli.

Sambært § 66 í barnaverndarlógini hava tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan og børn, ið eru fylt 15 ár, kærurætt, og verður henda áseting eisini galdandi fyri hesa lógarbroyting.

Samanumtikið inniber lógarbroytingin ítøkiliga, at tann ella tey, ið hava foreldramyndugleika, og børn, ið hava fylt 15 ár, kunnu kæra avgerð um val av fosturforeldrum til Høvuðsbarnaverndarnevndina innan 4 vikur eftir, at avgerðin er tikin.

Ummæli
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá:

Føroya Kærustovni
Høvuðsbarnaverndarnevndini

Barnaverndarstovu Føroya
Føroya Kommunufelag
Fosturforeldrafelagnum

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

**Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

**Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ta umsitingarligu avleiðing, at avgerðir, ið áður ikki hava verið mettar at vera fyrisitingarligar avgerðir, framyvir skulu kunna kærast til Høvuðsbarnaverndarnevndina og harvið gerast ein partur av arbeiðsøkinum hjá nevndini.

**Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna

**Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**Marknaforðingar**
Ongar marknaforðingar eru á økinum.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarliga/búskaparliga avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarliga avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1:**
Lógarbroytingin hevur við sær, at kærumyndugleikin í avgerðum um val av fosturfamilju verður fluttur frá kærunevndini í almanna- og heilsumálum til Høvuðsbarnaverndarnevndina, ið verður mett at hava betri førleikar at viðgera hesar kærur.

At avgerðir um val av fosturforeldrum ikki verða freistaðar um tær verða lagdar fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina merkir, at valið hjá Fosturforeldraskipanini av fosturforeldrum stendur við, hóast avgerðin er kærd til Høvuðsbarnaverndarnevndina, soleiðis at barnið verður búgvandi hjá fyrst valdu fosturforeldrum til nevndin hevur tikið avgerð í kærumálinum.

Kærur hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini eftir hesi áseting kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika, men kunnu eftir vanligum reglum leggjast fyri dómsvaldið. Avgerðirnar verða ikki freistaðar, um tær verða lagdar fyri dómsvalið. Tað vil siga, at um Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur tikið eina avgerð, og avgerðin verður løgd fyri dómsvaldið, verður avgerðin hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini kortini sett í verk. Tað, at rætturin viðger málið, steðgar ikki avgerðini hjá nevndini.

**Til § 2:**
Gildiskomuregla.

Almannamálaráðið, 26. januar 2016

**Eyðgunn Samuelsen**
Landsstýrismaður

/Eyðun Mohr Hansen